## DAGSINS MEINING

# Eitt stig tann rætta vegin

Í vikuni baði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at tann deildin í Toll og Skattstovu Føroya, sum skal umsita oljuskatt, skal leggjast út á bygd, partvíst til Norðyggjar og partvíst til Suðuroyar. Hetta er í samljóð við tað, sum útjaðaranevndin mælti til í áliti sínum, og hetta er eisini ein partur í kolvetnislóggávuni, har sagt verður, at ágóðin frá kolvetnisvinnu skal koma øllum landinum til góða.

Tað er at fegnast um, at ein landsstýrismaður fylgir álitum og tilmælum ella andanum í lóggávuni, sum kanska ikki altíð er so ítiøkilig í orðum. Serliga í hesum tíðum, tá gongdin bendir á, at alt er við at trunkast saman í Havn, og at øll vilja flyta til høvuðsstaðin, har tað er alt ov trongligt frammanundan. Avleiðingin er, at húsaprísirnir flúgva uppeftir, skúlarnir gerast trengri og trengri og bíðilistarnir til vøggustovur og barnagarðar gerast alsamt longri.

Men at flyta nøkur fáa arbeiðsspláss út úr Havnini ger ongan mun, vil onkur siga. Hinvegin mugu vit ásanna, at alt ger mun. Spurningurin er ikki, um vit í fyrstu atløgu flyta 5 ella 25 arbeiðspláss úr høvuðsstaðnum. Spurningurin er hinvegin um at seta eina tilgongd í verk, sum merkir, at tað er ikki ein sjálvfylgja, at allir stovnar og at øll fyrisitingin skal liggja í Havnini. Vit liva í fjar- og samskiftisstíðum. Hetta merkir, at vit kunnu samskifta og avgreiða mál, líka mikið hvar vit sita í landinum - á Argjum ella í Fugloy.

Nakað annað er so, um tað er rætt at flyta deildina, sum skal umsita eina trupla kolvetnisskattalóggávu úr miðfyrisitingini. Tað sigst, at hetta er eitt trupult mál, sum krevur stóran serkunnleika, kanska útlendskan við, og tí hevði kanska verið rættast, at hetta økið lá í høvuðsstaðnum. Men ber tað til at leggja tað út, so er tað í fínasta lagi, at tað verður lagt í Klaksvík og í Suðuroy.

Vit munnu koma burtur frá tí vanahugsan, at alt skal ligggja í Suðurstreymoy. Vit mugu hugsa um útjaðaran, og vit mugu taka álitini um útoyggjarnar og útjaðaran í størsta álvara. Tí er tað frálíkt, at landsstýrið hevur tikið stig til eina spjaðing á fleiri økjum. M.a. við at leggja heilsuskúlan í Suðuroy og nú við at leggja partar av skattafyrisitingini til Norðoyggjar og Suðuroyar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ikki øll í Smærugøtu

**Ragna Jacobsen**
*Smærugøta*
*100 Tórshavn*

Sum ein av teimum, ið býr í Smærugøtu, fer undirritaða við hesum at gera vart við, at tað als ikki eru allir Smærugøtubúgvar, sum taka undir við mótmælunum ímóti, at menningartarnað búsetast í gøtuni. Tvøtur ímóti eru vit fleiri, sum ynskja teimum hjartaliga vælkomnum, og sum ætla at gera okkara til, at tey fara at kenna seg væl.

Ein bleiv ikki bert kløkk av greinini í Sosialinum um mótmælini móti ætlaða sambýlinum, ein skammaðist rætt og slætt. At hugsa sær, at menningartarnað fáa slíka viðferð her á landi anno 2001. Menningartarnað, sum hvørki hava lyndi ella førleika til at teinkja ein óndan tanka, enn minni at fremja ónda gerð.

Um vit, sum búgva í Smærugøtu, ikki hava dirvi og/ella orku at gerast grannar hjá menningartarnaðum, hvør skal so hava tað?

Um vit í Smærugøtu ikki eru sinnað at góðtaka menningartarnað og geva teimum ans, hvør skal so gera tað?

Havi hug at seta teimum mótmælandi ein spurningur til umhugsunar. Hvørji verða óynskt, tá tey menningartarnaðu eru flutt úr eygsjón tykkara? Hvørji eru tey tá, sum ikki lúka treytirnar sum góðtiknir grannar?

# A – Pro – Pos - Smærugøta

**Rasmus Rasmussen**



Hugsaði fyri meg sjálvan nú ein dagin, um gøtunøvn í Havnini, ið uppkallað eru eftir plantum s. s. Smærugøta, Sóljugøta, Børkugøta o. s. fr. – hugsaði, navnið Smæra er vakurt – fitt lítil føroysk planta, sum tú kanst frøast um. So at vaksa upp har sum barn mátti vera praktfult – bert at siga tað sum vaksin – eg vaks upp í Smærugøtu – praktfult.

Las nú í Sosialinum tann 5/7 grein, har nøkur búsitandi fólk í Smærugøtu mótmæla, at eini hús skulu nýtast sum sambýli fyri menningartarnað, og undirskriftir verða sendar landsstýrismanninum við almannamálum og leiðaranum í serstovnadeildini, um at – ja – tað lýsir ígjøgnum greinina, at hesi menningartarnaðu fólk ikki eru ynskt á Smærugøtu, samstundis at hesi fólk – gangi eg sjálvur út ífrá – kallað seg »normal« og betur virkandi – hava ein heila og eitt hjarta – munurin á teimum, og teimum menningartarnaðu er, at tey menningartarnaðu hava rættin til tað sama, men heilin virkar ikki so væl, men hjartað tvífalt so væl.

Sjálvur havi eg starvast skjótt 30 ár í Danmørk og Føroyum við menningartarnaðum fólki og havi ongantíð havt trupulleikar av teimum, men haraftur-ímóti teimum í samfelagnum, sum sjálvi kallað seg »normal«. Tankin um at vit í dag skriva 2001 og enn hava nøkur fólk, ið eg vil kallað »útihýsa« fólki frá at hava eitt stað at búgva – fólk, sum hava eitt handikapp, og omaná skulu føla seg útihýst frá at hava sítt egna heim, sum er ein menniskjarættur. Hesi fólk føla seg ikki vælkomnan har tey koma, ikki bert í Smærugøtu, men eisini til tiltøk av ymsum slag t. d. konsertir, matstovir o. s. fr. – sum øll sigast at hava rætt til. Eg kann fortelja hesum fólkum, ið mótmæla. Tit kunnu fáa grannar, ið eru nógv verri, av tí sokallaða »normala« slagnum. Eitt lítið aftrat – Guð – lat tað ikki henda, at tit sjálv fáa eitt menningartarnað barn, og um so skuldi verði, fær pípan eitt annað ljóð, og tit øll »turna« 180 stig, og broyta hugsan.

Í greinini eru eisini okursprísir av húsum nevndir. Hetta luktar fyri mær sum rein øvund. Húsaprísirnir fara ikki upp fyri tað, at tað almenna keypir hús til menningartarnað fólk, tað eru heilt aðrir faktorar sum spæla inn. Eisini stendur í greinini, at fólk mugu steingja hurðarnar fyri hesum fólkunum, eg persónliga steingi eisini altíð hurðarnar hjá mær, men ikki serliga fyri menningartarnaðum, men fyri øllum óviðkomandim, tá ið eg ikki eri heima ella eri farin til songar. Tað er ikki eitt opið Vestre Fongsul ella Horserød, ið tit koma at hava til grannar. Greinin í Sosialinum tann 5/7 endar við, at tað verður so keðiligt at búgva í gøtuni, men eg vænti, at tað verður nógv stuttligari.

P.S. Tá ið eg aftaná havi skrivað hesa grein og lisið greinina í Sosialinum seinastu viku, hugsi eg við mær sjálvum, at tað skal ómetaliga lítið til at ein sjálvur situr í koyristóli – menningartarnaður– so ein skal ikki ganga runt og trúgva, at hann er nakað!

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Provokerandi skúlatankar og verkætlanarundirvísing á Føroya Læraraskúla

**Viðmerking til grein í Fregnir nr. 12, Paula Nielsen og Hans J. Hansen**

**Magnus Pauli Poulsen og Jógvan Philbrow úr 3.P 2001**

Í samband við grein í Fregnir nr. 12 hava fleiri viðmerkingar verið í bløðunum. Eftir reaktiónunum hjá Paula Nielsen, rektara, og Hans H. Hansen, eru okkara sjónarmið og meiningar eftir øllum at døma ikki komnar nóg væl til kennar í Fregnir. Pauli og Hans hava skilt okkara støðu sum, at vit m.a. ikki vilja hava og enntá ikki skilja endamálið við verkætlanarundirvísing, so sum Føroya Læraraskúli vil praktisera hana. Og at vit heldur vilja hava gomlu pultundirvísingina við krossum í protokol, ávíst tal av síðum at lesa til hvønn dag og yvirhoyring av næmingunum. Hetta er ikki so.

Tað, sum serstakliga vit pedagoglesandi havast at, er vánalig samskipan av undirvísingini, og manglandi krøv og uppgávur - ja manglandi høvuðsinnihald í undirvísingini yvirhøvur. Stutt sagt ov vánalig undirvísing, vegleiðing og manglandi karmar. Her verður sipað til, at eingin miðvís ætlan liggur fyri undirvísingina, serstakliga pedagogútbúgvingina: Teir frælsu karmarnir eru blivnir til ongar karmar - hvør einstakur lærari avgerð hvat hann/hon heldur at pedagoglesandi eiga at vita - eingin yvirskipa regla er. Og so tá ið teir lærarar sum eru um pedagogútbúgvingina ikki megna at samstarva á fullgóðan hátt, sigur tað seg sjálvt at alt ikki hongur saman.

Rektarin førir fram, at pedagogútbúgvingin og undirvísinging er merkt av sokallaðum "verkætlanum". Lat okkum hyggja at, hvat fyri verkætlanir vit hava havt hesi 3 árini sum pedagoglesandi á Læraraskúlanum: Aftaná byrjaða skúlagongd í 1. P summarið 1998 var áðrenn heystfrítíðina vanlig skúlagongd og ein mánaðarlang verkætlan í handaligu fakunum. Eftir heystfrítíðina til jólar vanlig skúlagongd, saman við eini verkætlan - har fríggjadagurin var avsettur - um ymiskar góðar førleikar hjá pedagoginum. Eftir jól 13 vikurs praktikk (allar praktikkir umfata eina uppgávu, sum skal leggjast fram eftir praktikktíðina) og vanlig skúlagongd við tímatalvu og pultundirvísing. Hendan pultundirvísingin var á leið. Samanumtikið eitt sindur undir miðal skúlaár við 2 rímuliga væleydnaðum verkætlanum, hóast onnur kundi verið betri fyriskipað.

Í 2. P skrivaðu vit eina uppgávu í sálarfrøði - hon var einar 7 síður til longdar. Og vit skrivaðu eina "stílkenda" 2 síðurs uppgávu um eina grein vit høvdu lisið - eisini í sálarfrøði. Restin var 13 vikurs praktikk og pultundirvísing, onkuntíð vánalig, men á leið. Og so eitt miseydna projekt í einum faki, har flokkurin ikki fingu hvørki høvd ella hala á, hvat endamálið og úrslitið við projektinum skuldi vera - við tí úrslitið at tað upploystist.

Í 3. P hava vit onga verkætlan havt. Bert vanliga skúlagongd og 14 vikurs praktikk. Og pultundirvísingin hevur verið stak vánalig - ofta tí tímatalvan ikki hevur verið fylgd, og broytingar mugu gerast tí lærarar hava aðrar uppgávur at taka sær til. Allar hesar mánaðar við pultundirvísing hevur tað verið gjøgnumgangandi - tó ikki hvønn dag - at vit eru møtt í skúlanum kl. 8-9 um morgunin, fyri at vera send til húsaftur 2-3 tímar seinni. Vit hava lisið 2 bøkur í 2 fakum, sum vit so hava gjøgnumgingið í bólkum - kapittul fyri kapittul. Vit hava eisini havt tað skipan, at vit hava verið undirvíst eina viku í senn í einum faki - og fleiri av hesum vikum hava verið lítið gevandi.

Okkurt hevur verið afturat, men hetta eru høvuðspunktini í okkara skúlagongd higartil.

Gjøgnumgangandi fyri tey síðstu 1 1/2 árini er, at lítil og ongin krøv hava verið sett til okkum, og alt ov fáar - so gott sum ongar (burtursæð frá praktikkuppgávunum) - uppgávur eru tilskilaðar okkum. Vit hava meiri enn einaferð gjørt vart við teir manglandi karmarnir, og at alt, alt ov lítið er á skránni, men einki er hent. Tað er henda støða, ið er orsøkin til at tað kókar yvir nú móti endanum. Vit hava bíða. Bíða eftir at okkara eftirmetingar skulu geva eina ella aðra reaktión, og at skúlagongdin skuldi gerast betri. Tí flokkurin hevur havt fleiri eftirmetingar - og hava eisini vent okkum til rektaran. Men lítið og einki er hent.

Samanumtikið vilja vit undirstrika, at okkara gleps ikki var eitt álop á verkætlanarundirvísingina og ein hálovan av pultundirvísingini, men ein generellur kritikkur av samskipanini av undirvísingini á skúlanum. Vit taka undir við tí verkætlanarorienteraðu undirvísingini - trupulleikin er bara at hon ikki hevur verið praktisera serliga nógv í okkara flokki. Og tá hon hevur verið praktiserað, hevur hon ofta rigga illa - vegna vantandi samskipan. Vit skulu her skoyta uppí, at lærararnir á Føroya Læraraskúla ikki eru verri enn lærarar á øðrum skúlum - og vit hava eisini fingið góða undirvísing á Føroya Læraraskúla - trupulleikin eru eftir okkara tykki vantandi samstarvi og karmar.

"Nýggjir skúlatankar eru provokerandi" sigur Pauli Nielsen í aftursvarið til greinina í Fregnir. Nei, vit eru ikki blivnir provokeraðir av hesum "nýggju" skúlatonkum, tí vit taka fult og heilt undir við teimum. Tað einasta vit eru blivnir provokeraðir av á Føroya Læraraskúla, eru óskipaðum verkaætlanum og keðiligari og lítið gevandi pultundirvísing. Og at vit sleppa at ganga so gott sum uttan gevandi avbjóðingar í fleiri ár. Hevði væl fyrireikað verkætlanarundirvísing verið reglan heldur enn undantakið, so skuldi nógv gott og gevandi komi burturúr. Fyri okkara viðkomandi hevur tað bara ikki verið so.

# Enn eitt sjálvmál

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Sámal Petur í Grund setur spurning við mítt trúvirði og heldur lítið um mína skriving. Men hon er væl ikki nógv øðrvísi enn tann hjá Torbjørn. Man stílur hava nakað við eftirnavn at gera? Meðan Torbjørn fekk rósandi yrking fyri sín, fái eg rís fyri mín. Kanska trúgvin ger munin. Ella er tað bert eitt tiltrongt høvið hjá Gamla Sjálvstýrinum, og samb. veljarakanningum, skjótt Fyrrverðandi Sjálvstýrinum, at markera seg í eini seinastu desperatu roynd at tryggja ein tingsess til næsta valg.

Sámal Petur ger sama feil sum Helena. Hann lesur ikki tað sum skriva stendur. Tað sum Eivind viðmerkti til Høgna Hoydal var um Almannaútreiðslur frá 1990 til 2001. Her gloymdi Høgni við vilja at rokna við prísvøkstri. Tað er skaðiligt fyri trúvirði at misbrúka tøl móti betri vitan. Tað haldi eg Høgna Hoydal, verða ov góðan til. At aðrir eru líka ringir og verri er eingin umbering. Úrslitið verður ósakligt kjak.

Um Sámal Petur hevði hugsa seg um, hevði hann óiva verið samdur við mær í, at lønir hækka vanliga meira enn inflatiónin. Men tá eingin játtar pengar til útgerð, verður talan bert um meirútreiðslur, onga effektivisering og tænastustøði stendur í stað. Sjálvandi gjørdu starvsfólk sítt besta áðrenn lønin hækkaði, eins og tey gera tað aftaná. Tí vil eg pástanda, at hækking av útreiðslum til Almanna -og Heilsumál, umframt inflatión, bert er tað sum fagfeløg hava bart seg til. Veit heldur einki um at Karstin hevur givið nakað.

Størri útreiðslur og betri tænasta eru ikki altíð relativ. Tí vil eg framvegis pástanda, at tænastustøði ikki er betri enn tað var í 1990, og heldur ikki betri enn tað var í 1998. Hækking av pensjónum v.m. fer øll í dýrari olju, skatti og øðrum príshækkingum.

### Væntandi almannaveiting

Tað sum eyðkennir fullveldismenn er ikki virðing og skil fyri pengum. Tá vit tosa um útreiðslur og tørv, eiga vit at meta hann í mun til ráðini. Politikkur er kompromi og raðfesting. Tí eiga vit at meta viljan hjá einum sitandi stýri eftir, hvussu stór inntøkan er í mun til, hvussu nógv teir brúka á einum ávísum øki. Hetta er einasti máti vit kunnu brúka. Tá vit gera tað, síggja vit, at í dag rópa fólk allastaðni frá um at tað manglar. Men hvat ger samgongan. Jú, teir reypa um yvirskot. Hvar er virðingin fyri teimum sum tørva. Tá tey gomlu mangla 2 krónur, fyri at klára seg, reypa tit av, at tit hava givið teimum eina krónu og sett eina í Landsbankan.

Sámal Petur sigur eisini, at ongantíð er nakað hækka so nógv sum á Almannaøkinum. Minni er stutt. Ongantíð í søguni er nakað hækka relativt so nógv sum løn og eftirløn til ting- og landsstýrismenn. Tí siga vit, tú ein lítlan, eg ein stóran.

Sámal Petur sigur, at játtanin til Almanna- og Heilsumál er hækka nakrar hundrað milliónir. Hetta er ikki rætt. Fíggjarlógin er hækka nógvar hundrað milliónir, meðan Almanna- og Heilsumál er so vítt eg minnist bert er hækka uml. 150 mió. Ella uml. 10-15%

Annars kann uplýsast at útreiðslur Landskassans, undir leiðslu Sambandsfloksins, til Almannaútreiðslur í 1980/81 vóru 317 mió, og í 1983/84 vóru tær 430 mió. Ella ein øking uppá 113 mió í 3 ár, sum er tað sama sum 35,6%. Hetta er sjálvandi írokna inflatión.

Vónandi er hetta nøktandi svar til Sámal Petur. Í hvussu so er skal hann folda seg út, um hann skal yvirhála Sambandsflokkin.

Sanniliga hevur Eivind sínar feilir, men trúvirði líður onga neyð. Vónandi kunnu øll siga tað sama.

